# ítróttur

Nr. 15 • Fríggjadagur • 20. januar 2006 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Bara fýra Formula-feløg hava sáttmálar

**Hóast FSF-góðkenning av spælarasáttmálum er eitt krav, eru tað bert fýra av teimum tíggju feløgunum í Formula-deildini, sum hava slíkar sáttmálar. AB og B71 eru feløgini, sum hava flestar spælarar við góðkendum sáttmálum**

**FSF-SÁTTMÁLAR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Skal ein spælarasáttmáli hava gildið innan føroyska fótbóltsheimin, so er eitt krav, at hesin er góðkendur av FSF.

Tað hevur verið reglan, sum føroyskur fótbóltur hevur arbeitt eftir, og í ávísum førum hevur hetta skapt trupulleikar hjá feløgum, tá tey ikki hava havt sáttmála við spælara, sum tí er farin í annað felag. Nakað sum fleiri ítøkilig dømi hava verið um seinastu trý-fýra árini.

### FAKTA

**■ Feløg uttan sáttmála**

B36
Skála
ÍF
VB
GÍ
B68

**■ Feløg við sáttmála**

| | |
|---|---|
| **Formula-deildin** | |
| HB | 11 |
| EB/S | 8 |
| KÍ | 9 |
| NSÍ | 4 |
| **1. deild** | |
| Sumba | 1 |
| B71 | 12 |
| AB | 12 |

### 57 sáttmálar íalt

Eftir stóra málið um spæliloyvi í fjør, har KÍ og B36 vórðu dømd at tapa dystir sínar í kappingini um Løgmanssteypið, vóru boðini frá FSF, at tað í størri mun skuldi vera alment gjøgnumskygnin í loyvisgevanini. Eitt, sum tá varð nevnt, var at øll spæliloyvi skuldu leggjast út á heimasíðuna, og nú hevur FSF tikið fyrsta stigið mótvegis hesum.

Í fyrsta umfari er talan tó um yvirlit yvir sáttmálabundnar spælarar, og fyri nógv man hetta vera skelkandi lesnaður. Tilsamans hava bara 57 sáttmálar FSF-góðkenning, og av hesum eru bara teir 40 í Formula-deildini.

Tað vil við øðrum orðum siga, at verður sæð burtur frá hesum 40 sáttmálabundu spælarum, eru allir spælarar í Formula-deildini í veruleikanum fríir fuglar. Sjálvandi hevur ein sáttmáli gildi skilt soleiðis, at feløg kunnu velja at fara rættarliga vegin, um talan er um sáttmálabrot. Men hvat spæliloyvum og tilknýti til felag viðvíkur, hava ikki-góðkendir sáttmálar altso ikki gildi. Vil ein spælari, sum ikki hevur FSF-góðkendan sáttmála skifta felag, kann hetta gerast sambært reglunum fyri áhugaleikarar. Og tað átti alt annað líka at verið eitt satt ræðsluscenario fyri feløgini.



*Eitt nú er merkisvert at síggja, at hvørki Skála ella B36 hava ein tann einasta spælarasáttmála skrásettan í FSF-góðkenningini*

Skal metast eftir yvirlitinum á www.football.fo, so er hetta tó ikki nakað, sum hevur serliga stóra ávirkan á leiðslurnar í feløgunum.

Bara fýra av teimum 10 feløgunum í Formula-deildini hava sáttmálabundnar spælarar yvirhøvur, og hjá onkrum felag er talan um spælarar, sum eru bundnir at felagnum við atliti at framtíðini, heldur enn sum týðandi partur av hópinum her og nú.

Verður hugt at yvirlitinum yvir góðkendar spælarasáttmálar, sum FSF nú hevur lagt út á heimasíðu sína, so tykist hetta tó ikki at hava serliga stóran ávirkan á ymsu fótbóltsfeløgini.

Í deildini, sum helst kemur at eita 1. deild í komandi kappingarári, tykjast tað fyrst og fremst vera AB og B71, sum hava aktað boðini úr FSF, meðan Sumba hevur ein spælara skrásettan. Hesin er málverjin hja felagnum, Marcin David. Við samanleggingini av VB og Sumba í huga, er tó kanska rættari, at hesin verður roknaður sum heimahoyrandi hjá VB í Formula-deildini.

Fullfíggjaði listin yvir spælarasáttmálar kann síggjast á heimasíðuni hjá FSF, www.football.fo.

# Niclas fer um fjørðin

**Verjuspælari biður barndómsfelagnum í Klaksvík farvæl og fer nú at umboða GÍ, sum framvegis leitar eftir styrki til álopið og millum stólparnar**

**GÍ**
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Ein klaksvíkingur, sum býr og arbeiðir í Klaksvík, og sum higartil bara hevur umboðað KÍ, fer hetta kappingarárið at spæla við GÍ. Talan er um miðverjan Niclas Niclasen. Avtalan um samstarv sum var millum Niclas og KÍ er strikað, og GÍ og Niclas hava gjørt avtalu um samstarv. Tað váttar GÍ formaðurin, Brandur Jacobsen, sum sigur seg vera fegnan um, at tað nú hevur eydnast at fáa tveir stinnar verjuspælarar at styrkja um GÍ liðið. Hin er gamli GÍ kenningurin Poul Ennigarð, sum í fjør spældi við ÍF.

Ætlanin var annars, at Niclas eisini í ár skuldi spæla við KÍ. At einki verður burtur úr tí ætlanini kemst av, at verjuspælarin ikki er sinnaður at ganga undir allar treytirnar, sum nýggi KÍ venjarin, Tony Paris, hevur sett spælarunum í Klaksvík. Tí metti venjarin, at tað var best fyri allar partar, at spælarin fann sær nýtt felag, sigur John William Joensen frá KÍ. Og nú er greitt, at Niclas fer at spæla við GÍ.

Í fjør vandi Niclas Niclasen, sum er 26 ára gamalur, eitt skifti við B36, men tá ið alt kom til alt spældi hann kortini við KÍ.

### Leita framvegis

Fyri stuttum hevur GÍ havt tveir útlendskar spælarar til royndarvenjingar. Talan var um ein málverja og ein álopsspælara, sum báðir hava roynt seg í AGF. Teir vandu nakrar ferðir eftir ársskiftið við GÍ, men nú eru teir farnir avstað aftur.

–Vit hava ikki tikið endaliga støðu til, um vit skulu bjóða teimum samstarv ella ikki. At hesir útlendingarnir vóru her og royndarvandu komst sjálvandi av, at vit halda okkum hava brúk fyri spælarum, sum kunnu vera við í kappingini um málverjuplássið og eitt pláss í álopinum. Men um talan skal verða um samstarv við útlendskar spælarar, so skulu tað vera spælarar, sum heilt týðuliga eru stinnari enn teir, sum vit longu hava, staðfestir GÍ formaðurin Brandur Jacobsen, sum saman við hinum í GÍ framvegis hevur eyguni við, hvørjar møguleikar teir hava fyri at styrkja um liðið.

## Zidane setir skógvarnar á hillina



**Franski miðvallarin Zinedine Zidane gevst við fótbóltinum eftir HM-endaspælið í summar**

Hetta skrivar spanska blaðið AS, sum sigur víðari, at Zidane hevur boðað leiðsluni í Real Madrid frá, at hann ikki ætlar sær at halda fram í felagnum eftir summarsteðgin.

33 ára gamli Zidane hevur sáttmála við Real Madrid, ið rennur til summarið 2007, men hann ætlar sær ikki at spæla so leingi. Hóast Zidane skoraði trý mál í dystinum ímóti Sevilla sunnudagin, hevur hann ikki víst ta stórspæl, ið hann er so kendur fyri, seinastu tíðina.

Zidane valdi saman við øðrum garvaðum leikarum at venda aftur til franska landsliðið, tá tað stóð á gomlum nøglum undir seinastu undankapping, og hann verður væntandi at síggja á liðnum í Týsklandi í summar, men tað verður eftir øllum at døma seinastu ferð, at hann luttekur á hægsta stigi.

Zizou, sum hann eisini verður nevndur, er kosin heimsins besti fótbóltsspælari tríggjar ferðir, og hann var eisini ein av berandi kreftunum á tí franska liðnum, sum vann HM á heimavølli í 1998 og EM í Hollandi tvey ár seinni.

Zidane hevur harumframt fingið tittulin Légion d´honneur fyri síni avrik fyri franskan fótbólt, og hann fekk eisini heiðurin at bera fakkulin, tá olympisku leikirnir í Athen vórðu settir í 2004.